Álit

í

løgtingsmáli nr. 87/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vernd av persónsupplýsingum (Dátuverndarlógin) (Rætta tilvísingar og strika kravið um navnloysi og ókenniligheit í sambandi við almannakunngering av avgerðum hjá Dátueftirlitinum)

Landsstýrismaðurin í lógarmálum, Bjarni K. Petersen, hevur lagt málið fram tann 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 22. mars 2024 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 3., 11. og 16. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Dáturáðið og Dátueftirlitið, Landssjúkrahúsið, landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Margit Stórá, og landsstýrismannin í lógarmálum, Bjarna K. Petersen.

Ein samd nevnd heldur tað hava stóran týdning, at dátuverndin í Føroyum er nøktandi og á sama støði sum í londunum, sum vit sammeta okkum við og samstarva við.

Hendan broytingin, at Dátueftirlitið kann almannakunngera sínar avgerðir, uttan at tær skulu vera navnleysar og so ókenniligar sum gjørligt, stuðlar undir, at dátuábyrgdarar og dátuviðgerar betur kunnu kunna seg um siðvenju og tulkingar í sambandi við dátuverndarlógina.

Tað er í dag ein avbjóðing hjá Dátueftirlitinum á nøktandi hátt at almannakunngera prinsipiellar avgerðir, tí kravið um navnloysi og ókenniligheit ber í sær, at upplýsingar, sum hava týdning fyri niðurstøðuna í málinum, í fleiri førum mugu strikast úr avgerðunum, og tí er nyttuvirðið av almannakunngeringini avmarkað.

Hinvegin hevur tað eisini týdning, at starvsfólk á stovnum og fyritøkum ikki kenna seg hongd út fyri hendilig mistøk. Til hetta er at viðmerkja, at kravið um navnloysi verður varðveitt fyri einstaklingar, og ætlanin er ikki sambært uppskotinum at almannakunngera allar avgerðir, men einans tær, sum Dátueftirlitið metir hava prinsipiellan týdning fyri, hvussu lógin skal skiljast, ella sum hava stóran týdning í sær sjálvum.

Við hesum viðmerkingunum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 17. apríl 2024

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen næstformaður	Kristianna W. Poulsen
Henrik Old	Kim Durhuus	Steffan Klein Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur